# Ein heilsan til mammu mína, Thurid Abrahamsen, Fuglafirði á 90 ára føðingardegnum

**– og ein lýsing av nøkrum minnum, sum meg minnist frá mínum foreldrum frá ungdóms- og mandómsárum**



At skriva um barnaminnir er ikki so heilt lætt, tí flest øll eru av tí áskoðan, at tey eiga ella hava átt tey bestu foreldrini.

Ójavnt sum lívið lagar seg fyri hjún. Summi fáa als eingi børn. Onnur fáa børn, sum tey missa sum heilt smá, og aftur onnur fáa børn og missa burturav, tá tey eru tilkomin.

Mamma og pápi fingu tað, sum ein kann kalla ein stóran barnaflokk. Vit vóru ikki færri enn 15 systkin, 7 systrar og 8 brøður.

Meg minnist mammu og pápa sum, at guðsóttin varð hornasteinurin í lívinum hjá teimum, og eftir tí blivu vit uppald. Hvat vit hava tikið til okkum, tað er ein onnur síða av sakini. Viðvíkjandi tí dagliga arbeiðinum, so kann eg av góðum grundum ikki úttala meg um, hvussu tað var hjá teimum eldru systkjunum, tí sjálvur eri eg nr. 11 í røðini. Vit yngru blivu sett til at luttaka í tí dagliga arbeiðinum frá heilt umgum av, tað veri seg at vera við at hoyggja, at passa kúnna og seyðin, at reinsa hjá hønunum, og dunnunum, at vera við til at seta niður eplir og at taka upp aftur og onnur smá gerandislig arbeiðir, sum skuldu gerast. Burtursæð frá torvi og hoyggi, so vóru uppgávurnar hjá systrunum mest innandura.

Meg minnist meg bert eitt árið at hava verið við í torvi. Tað árið róðu vit tann eina dagin við 4-mannafarinum hjá pápa norður á Góðadal. Vit vóru: abbi okkara, Óli á Bakkanum, mamma, Astrid, Anna, Tórfríður og eg. Báturin bleiv bundin á Góðadals gjógv. Tá dagurin so var liðin, róðu vit heimaftur.

Tá eg var smádrongur, tá var hvørki vaskimaskina, sentrifuga, uppvaskimaskina ella turkitrumla vanligt í tí føroyska húsarhaldinum og heldur ikki hjá okkum. Tær løtur, sum bæði mamma og systrar okkara hava brúkt, bæði til at vaska klæðir, vaska upp og at vaska inni, tær eru ikki so fáar. Hevði mamma ikki dugað so væl at fingið burturúr døtrunum/ systrunum og at sett okkum til arbeiðis, so hevði byrðan hjá henni verið munandi størri. Eg ivist onga løtu í, at tað er komið teimum til góða seinni, og at tær høvdu ein góðan førning við sær, tá tær sjálvar fóru at halda hús.

Pápi arbeiddi ofta burturi, og tí lá ofta nógv á mammu, men hon dugdi sera væl at hava okkum við til tað, ið gerast skuldi.

Hóast nógv var at hugsa um, so var umsorganin hjá mammu so ómetaliga stór fyri bæði pápa og sínum børnum.

Meg minnist, tá Abraham bróður fór av stað við TINGANESI á sumri 1958. Tá hann var farin, legði mamma til merkis, at hann hevði onki akslatræ við. Eg bleiv tí sendur at vita, um eg fekk fatur á bilinum fyri at geva honum hetta góða akslatræ. Meg minnist, at hann fór við bilinum hjá Jógvan Øregaard,- Jógvan á Lakjuni. Tá eg kom heim á krossin, har Sparikassin er nú, fór bilurin forbí hjá Ismar. Eg sá á Abraham, men hann sá ikki meg, og eg mátti til húsar aftur við akslatrænum. At tað skuldi vera síðstu ferð, at eg sá Abraham, tað grunaði eg ikki.

Meg minnist eisini sum tað var í dag, tá eg skuldi fara eitt ørindi oman til Haraldsen at keypa. Í úthurðini møtti eg Torkil Beder presti, sum spurdi eftir mammu. Eg segði, hvar hon var, og bað hann bíða, so fór eg míni ørindi. Tá eg kom aftur, tá var grátur og eymkan mikil, tí prestur var komin við deyðsboðum av Abrahami bróður, sum var sjólátin við útróðrarbátinum HAVSØKA, sum róði út frá skonnartini TINGANES. Teir vóru 3 mans við bátinum, tveir sjólótust, og tann triðji varð bjargaður í evstu løtu. Báturin, teir vóru við, var koppaður av einum boðabroti. Tað segðist, at menninir á bátinum, sum kom fram á tann hálvda bátin, sóu Abraham bróður, áðrenn teir komu til bátin, men tá teir náddu fram, var hann farin.

Vit vóru øll uppvand við, at tað er Guð, sum valdar ævum øllum, og mamma troystaði okkum við, at Abraham var farin til Jesuspápa, og tað var hansara vilji, at tað skuldi vera so. Hóast óskiljandi, so góðtóku vit, í hvussu er eg, at tað var Guðs vilji, at Abraham bróður var deyður. Hon sannførdi okkum eisini um, at eingin spurvur fellur til jarðar uttan Guðs vilja. Mamma hevði mangan á orði, at Abraham var spardur fyri nógv við at vera sloppin úr hesi verð so »óspiltur«, sum hann var. Hóast Abraham doyði 25. august 1958, so er tað enn fyri mær, sum um tað var í gjár. Abraham var 15 ára gamalur tá. Eg ivist ikki í, at tað er líka ringt fyri bæði foreldur og børn at missa børn ella systkin, um tey eru nógv í tali, ella um tey eru fá.

Einaferð fyri mongum árum síðani var missiónsvika í Fuglafirði. Tá var tað soleiðis, at av tí at missiónshúsið var so lítið, so endaði møtirøðin við møti í kirkjuni sunnukvøld. Tað árið, sum mær rennur í huga, tá var tað Edmund Abrahamsen í Garði á Strondum, sum kom at eita Edmund í Garði, sum talaði. Hvussu talan var, minnist meg ikki, men minnist væl tekstin, hann talaði yvir. Tað var Dávids sálma 37 ørindi 25, ið sigur: »Eg ungur havi verið, eri gamal vorðin, men onga tíð eg sá ein rættvísan uppgivnan, ella børn hansara bidda breyð«. Hóast eg ikki vildi gera pápa til eitt halgimenni, so var tað fyri mær, sum var tað pápa, hann talaði um.

Seinni fekk pápi fra tveimum av børnunum í jólagávu eina glasplátu við sama skriftstaði á.

Síðstu ferð mamma og pápi vóru saman inni hjá okkum (mær og konu míni), fall prátið inn á viðurskiftini viðvíkjandi húsarhaldinum. Pápi fortaldi tá, at tað hevði ofta verið smátt til at taka, men bert eina ferð vóru tey farin í song, har onki var at keypa fyri, einki breyð og heldur einki tilfar til breyð. Grindatunnan var tóm, og eingin fiskur var, hvørki feskur, saltur ella turrur. Tá tey fóru í song tóku tey sum so ofta eitt mannakorn. Á mannakorninum, hann hevði tikið, stóð skriftstaðið:

»Eg ungur havi verið, eri gamal vorðin, men onga tíð eg sá ein rættvísan uppgivnan, ella børn hansara bidda breyð«.

Pápi var kavari. Um náttina ringdi telefonin. Tað var ein, ið ringdi fyri skiparan á einum enskum trolara, sum hevði fingið um skrúvuna og var komin á Klaksvík.

Tann, ið ringdi, spurdi, um pápi kundi koma at fáa weirin av skrúvuni. Tað játtaði hann sjálvsagt, tí grundin til, at onki var at keypa fyri, var júst tann, at hann hevði einki arbeiði.

Tá pápi kom umborð á trolaran, segði skiparin við hann, at um hann kundi fáa weirin av, uttan at koma upp ímillum, so skuldi hann fáa 1600 kr. fyri arbeiðið, og tað vóru nógvir pengar tá.

Pápi fekk sær til vega tey amboð, sum vóru við hondina. Neyvan hava tað verið nútíðar amboð. Tað gingu heilir 11 tímar, áðrenn weirurin var av skrúvuni. Í allar teir 11 tímarnar setti pápi einaferð høvdið uppundan fyri at drekka eitt krúss av tevatni, sum skiparin bjóaði honum. Soleiðis var neyðin fingin frá durunum í tí førinum. Eg havi mangan, ávirkaður av somu hending, í mínum dagliga arbeiði hugsa tankan, at einki er so ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt.

Mamma hevur gingið í misiónshúsið alt tað, meg minnist. Í tí sambandinum hevur hon eisini verið í Sjómanskvinnuringinum.

Fyri nøkrum árum síðani var tað soleiðis í bygd okkara, sum man koma fyri so manga aðrastaðni, at nakrir ungdómar vóru komnir til ilnar. Í tí sambandinum segðist eisini, at knívurin hevði verið á lofti. Tann eini, ið hevði verið við í vásinum endaði á Landssjúkrahúsinum, meðan ein annar varð settur innan rimarnar í politigarðinum.

Tá fóru nógvar tungur til verka. Ikki var alt av tí góða. Summar søgdu, at hann hevði gott av at verða settur handan rimarnar. Hann skuldi bara uppført seg sum eitt fólk. Onnur søgdu, hvat skal tað verða, og so fingu bæði mamman og pápin, abbin og omman síni ummæli. Ikki vóru tey so tespulig.

Tá var tað at mamma í túninum við gráturødd kom til mín og fortaldi, at hon árið frammanundan hevði sent jólapakka til hin ókenda sjómannin. Í pakkanum var andaktsbókin »Kraft av nýggjum«, og tann pakkan hevði hesin sami drongur fingið.

Hon fortaldi mær eisini, at hesin sami drongur ein dagin var komin til hennara og hevði fortalt henni, at hann hevði fingið pakkan, og takkaði fyri bæði hosurnar og andaktsbókina. Tað, sum gleddi hana mest, var, at hann hevði fortalt fyri henni, at hann síðan tá hevði lisið í andaktsbókini hvønn dag. Hon fortaldi mær eisini, at hon síðan omanfyri nevndu hending hvørt kvøld hevði biðið fyri hesum unga dreingi.

Eg ivist ikki í, at tað eisini eru aðrar kvinnur, ið biðja fyri ungdóminum, sum eftir okkara tykki ikki skikkar sær so, sum vit halda, at ungdómurin eigur at gera, men hetta var so um eitt tilfeldi, sum mamma mín hevur fortalt mær.

At enda vil eg takka fyri alt tað, ið eg havi fingið frá mínum foreldrum. At eg átti at havt brúkt tað betur, tað kann so ikki leggjast teimum til last, men um eg og systkin míni ikki høvdu havt fingið tann andaliga førning, sum vit hava, ja so var støðan bara enn verri. Eg vil eisini takka Guði fyri, at vit fingu loyvi at hava mammu hjá okkum so nógv ár. Tað er ikki øllum lagað, heldur ikki í okkara familju. Pápi doyði bert 69 ára gamal, men gott er at kenna fløvan av hondini, ið slepti.

Góða mamma, hjartaliga tillukku á níti ára degnum við ynski um Guðs ríku signing framyvir

*Ellintur*

# ítróttur

Nr. 160 • fíggjadagur • 23. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Føroyar-Liktinstein 3-1 (0-1):

# Nýggjar tíðir á Tórsvølli

**Generalroyndin hjá Henrik Larsen hepnaðist væl. Við nýggjum venjara, nýggjari spælskipan og sanniliga eisini nýggjum veðrið eydnaðist loksins føroyska landsliðnum at skora á Tórsvølli, og 3-1 sigurin á Liktinstein var fult uppiborin, tó at bakgrundin kanska var av teimum bíligu**



*Eftir samfullar 600 málleysar minuttir á Tórsvølli, bragdaði endiliga hjá føroyingum, tá Christian Høgni Jacobsen fekk javna miðskeiðis í seinna hálvleiki ímóti Liktinstein*

*Mynd:Álvur Haraldsen*

LANDSDYSTUR

*Jákup Mørk*

Fram til mikudagin hevði Tórsvøllur onkursvegna tókst sum eitt forbannilsi hjá føroyska landsliðnum. Í seks landsdystum hevði tað enn ikki eydnast okkara monnum at skora á vøllinum, og ikki so mikið sum eitt einasta stig hevði lið okkara fingið.

Longu undan dystinum vóru tó tekin um, at okkurt nú skuldi broytast. Tað hevur hvørja ferð lagað seg soleiðis, at regnið hevur verið til staðar, tá Tórsvøllur hevur lagt gras til landsdystir, men hetta var so ikki støðan hesaferð.

Leingi vórðu føroysku áskoðararnir tó hildnir á pínubeinkinum. Móti pinkulingunum úr Liktinstein vóru Føroyar aftan fyri við einum máli í steðginum, men tá Christian Høgni Jacobsen fyrst hevði sett hol á, var eingin ivi. Føroyar vundu alt meira burtur úr mótstøðuni, og endin gjørdist ein tryggur sigur í fyrsta landsdystinum hjá Henrikki Larsen.

## Smærri broytingar

Sum vera man, so var spenningurin stórur, nú nýggi landsliðsvenjarin av fyrstan tíð skuldi royna seg. Ikki minst tí hann fyri langt síðani hevði boðað frá, at nú skuldi talan verða um eina 4-4-2 spælskipan, men eisini tí hann hevði boðað frá, at nakrar broytingar fóru at verða framdar á liðnum.

Tað vóru tó ikki tær heilt kollveltandi broytingarnar at síggja á liðnum hesaferð. Mest nýskapandi var tað tó, at Hans Fróði Hansen, sum undir Allani Simonsen var fastur fúsur, hesa ferð mátti taka til takkar við plássi á beinkinum. Í hansara stað varð ungi Jón Rói Jacobsen settur í miðverjuna frá dystarbyrjan. Ein broyting sum var væntandi, nú skift varð yvir til 4-4-2, tí í nógvar mátar hevur ungi havnarmaðurin betri fortreytir í hesari enn meira royndi toftamaðurin.

Meira neyðtvungnar vóru broytingarnar í borðunum, har Jóhannis Joensen og Arnbjørn Danielsen fingu møguleikan frá byrjan, nú hvørki Pól Thorsteinsson, Súni Olsen ella Jens Kristian Hansen vóru tøkir hjá landsliðsvenjaranum. Á miðvøllinum fekk Heðin á Lakjuni møguleikan frá byrjan, og so viðførdi nýggja skipanin eisini, at John Petersen hesa ferð varð fluttur av miðvøllinum niðan í álopið.

## Nýggja skipanin

Í venjingunum upp til dystin var sjónligt, at Henrik legði stóran dent á sonevnda skabelón-venjing, har tað fyrst og fremst ráddi um at venja leikararnar við flytingarnar í 4-4-2, og allan fyrra hálvleik hildu leikararnir eisini sera fast um hesar. Serstakliga í verjupartinum hepnaðist hetta væl. Hvørki miðvøllur ella verja endaðu púrasta fløt, soleiðis sum vandi kundi verið fyri, men dugdu teir í borðunum alla tíðina sera væl at skera inn í vøllin, soleiðis at bakkað varð upp, og yvirhøvur var hetta viðvirkandi til, at Jákup Mikkelsen í málinum var mest sum arbeiðsleysur.

Tær vandastøður, sum íkomu, stóðust í mestan mun av, at føroyska liðið í summum støðum hevði framsýning av veikleikunum í nýggju spæliskipanini. Nevnliga at tú tá hvørki hevur sweepara í verjupartinum ella á miðvøllinum, og soleiðis ert nógv verri fyri, um bóltar verða mistir í uppspælinum. Nakrar ferðir var um eisini um reppið, at heilt stórir møguleikar spurdust burturúr, tá føroyingar kiksaðu í uppspælinum, men tað eydnaðist tó mest sum hvørja ferð okkara monnum at byrgja fyri kortini, tó at tað onkun tíð stóð nógv á Óla og Jón Róa í hesum royndunum.

Fram eftir vøllinum var tað eitt sindur avmarkað, hvat føroyska liðið skapti fyrstu trý korterini, og hetta hevði tvinnar orsøkir. Ein var, at leikliga ferðin í nógvar mátar var ov lág. Føroyingarnir vórðu ongan tíð kroystir at seta leikferðina upp, soleiðis sum vit ofta verða móti størri tjóðum, og tí hevði Liktinstein mest sum hvørja ferð stundir at skipa verjuna av nýggjum.

Hin var, at leikararnir hjá okkum í mangar mátar vóru ov nær bundnir at nýggju skipanini fyrstu løtuna. Hóast 4-4-2 í stóran mun snýr seg um at arbeiða í sonevndum ketum, so er tað eisini av alstórum týdningi, at hesar ketur av og á verða brotnar við djúpum renningum, men hesar vóru mest sum ikki at síggja fyrstu trý korterini, og tí var tað eisini ógvuliga trupult at bróta verjuketurnar hjá mótstøðuni.

At hetta so kortini eydnaðist av og á, komst einamest av, at mótstøðumenninir konsekvent spældu við trimum í álopinum. Hetta gav føroyska miðvøllinum størri breidd, og tískil mundi breiði Tórsvøllurin eisini fyri fyrstu ferð vera ein fyrimunur hjá føroyska liðnum. Bæði Heðin og Jákup vóru sera dugnaligir at halda breiddina á borðunum, og tær fáu ferðirnar at verulig skift vórðu nýtt, var mótstøðuverjan oftani um ein háls í royndunum at byrgja fyri.

## Kaldur vøttur

Tað var tó sum nevnt omanfyri, sum um tað kortini ikki skuldi hepnast okkara at skora á Tórsvølli. John